Heilsumálaráðið

Dagfesting:	29. september 2023
Mál nr.:	23/18533-21
Málsviðgjørt:	GMM
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	23.09.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)
(Heilivágsstigin verður broyttur**)**

§ 1

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður § 18 orðað soleiðis:

"**§ 18.** Støddin á tilskotum er ásett eftir tilskotsprísunum sambært § 21 til heilivág o.a., sum veittur verður sambært §§ 13-16, og sum viðkomandi persónur hevur keypt innan fyri eitt ár frá fyrsta keypi. Eitt nýtt tíðarskeið byrjar, tá viðkomandi persónur aftur keypir tilskotsheimilaðan heilivág, eftir at gamla tíðarskeiðið er farið.
Stk. 2. Fyri persónar í aldrinum 18 ár til pensjónsaldur verður onki tilskot veitt, um útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár eru undir 1.000 kr.
Stk. 3. Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 1.000 kr., er tilskotið:

1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.000 kr. og upp til 2.500 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.500 kr. og upp til 4.500 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 4.500 kr. og upp til 8.000 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 8.000 kr.

Stk. 4. Fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar verður onki tilskot veitt, um útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár eru undir 600 kr.
Stk. 5. Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 600 kr., er tilskotið:

1) 30% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 600 kr. og upp til 2.800 kr.
2) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.800 kr. og upp til 3.100 kr.

3) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 3.100 kr.

Stk. 6. Børn og ung, yngri enn 18 ár, gjalda ikki egingjald.

Stk. 7. Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar.

Stk. 8. Um ein persónur verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 4 og 5.

Stk. 9. 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2-5 prístalsviðgjørdar í kunngerð."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Samanumtikið er yvirskipaða endamálið við uppskotinum at minka um útreiðslurnar hjá Heilsutrygd. Við at gera broytingar í tilskotsstiganum vísa metingar frá Heilsutrygd og Landsapotekaranum, at tað er møguligt at lækka útreiðslurnar við umleið 7,9 mió. kr. í útreiðslum tey komandi árini.

1.1. Orsakir til uppskotið

Útreiðslurnar til heilivág eru nógv hækkaðar, og tí er neyðugt at tillaga heilivágsstigan í heilsutrygdarlógini.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært § 18 í heilsutrygdarlógini veitir Heilsutrygd tilskot til persónar, sum keypa tilskotsheimilaðan heilivág. Tilskot verður veitt sambært tilskotsstiganum, alt eftir hvussu nógv verður keypt fyri innan fyri eitt tilskotsár. Tilskotsstigin er settur saman eftir einum progressivum leisti, soleiðis at borgarar, ið hava tørv á nógvum heilivági, rinda lutfalsligt minni enn tey, ið brúka lítið av heilivági. Allir borgarar, sum eftir ávísing frá lækna, keypa tilskotsheimilaðan heilivág á apotekunum kring landið, fáa tilskot. Landsapotekarin umsitur skránna við tilskotsheimilaðum heilivági, og tilskotið, sum Heilsutrygd rindar, verður drigið frá, áðrenn borgarin rindar á apotekinum. Heilsutrygd rindar síðani fyri ískoytið beinleiðis til apotekið. Tilskotið verður roknað eftir nýtsluni í einum tilskotsári, sum er tíðarskeiðið frá fyrsta keypi og 12 mánaðir fram. Næsta tilskotsár byrjar, tá ein persónur keypir fyrstu ferð, eftir at eitt tilskotsár er lokið. Eitt ávíst egingjald er á tilskotsheimilaðum heilivági; tó rinda persónar undir 18 ár ikki egingjald. Tað merkir, at tey fáa 100 % í tilskoti av tilskotsheimilaðum heilivági. Persónar, ið eru pensjónistar ella fyritíðarpensjónistar, hava lægri egingjald enn persónar millum 18 ár og 67 ár.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Samanumtikið er endamálið við uppskotinum at minka um útreiðslurnar hjá Heilsutrygd. Hetta kann gerast við at broyta heilivágsstigan, og vil tað geva landskassanum umleið 7,9 mió. kr. í minni útreiðslum. Harumframt verður “67 ár” í galdandi § 18, stk. 5 strikað, og í staðin verður skrivað “pensjónistur”. Ætlanir eru um at hækka pensjónsaldurin tey komandi árini, og tí verður mett skilabest, at tað í lógini stendur “pensjónsaldur” heldur enn eitt ávíst ár.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við broytingini verður lagt upp til, at tað frameftir verða tveir heilivágsstigar í heilsutrygdarlógini; ein heilivágsstigi til persónar 18 ár til pensjónsaldur, og ein heilivágsstigi til pensjónistar og fyritíðarpensjónistar. Tilskotsstigin verður broyttur við færri stigum og upphæddirnar fyri, nær tilskot verður veitt, verða eisini broyttar nakað, sí niðanfyri:

Galdandi tilskotsstigi hevur fimm stig fyri persónar í aldrinum 18 til 67 ár, eins og fimm stig fyri 67+ ár og fyritíðarpensjónistar.

Broytingarnar í uppskotinum viðføra harumframt, at heimildarásetingin í kunngerð nr. 152 frá 15. desember 2022 um prístalsviðgerð av tilskoti til tilskotsheimilaðan heilivág skal broytast, soleiðis at heimildarásetingin er røtt.

Tilskotsstigin pr. 1. januar 2023							
18-67 ár		Tilskot %	Egingjald í kr.	67+ og fyritíðarpensjónistar		Tilskot %	Egingjald í kr.
-	587	0%	587	-	587	0%	587
587	1.173	40%	352	587	1.173	40%	352
1.173	2.346	60%	469	1.173	2.346	60%	469
2.346	6.221	75%	969	2.346	2.793	75%	112
6.221	-	100%		2.793	-	100%	
Egingjald í alt			2.377	Egingjald í alt			1.520
Pr. mðr.			198	Pr. mðr.			127

Nýggi tilskotsstigin hevur fýra stig fyri persónar í aldrinum 18 til 67 ár, og trý stig fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar.

Tilskotsstigin pr. 1. januar 2024							
18 ár til pensjónsaldur		Tilskot %	Egingjald í kr.	Pensjónistar og fyritíðarpensjónistar		Tilskot %	Egingjald í kr.
-	1.000	0%	1.000	-	600	0%	600
1.000	2.500	40%	900	600	2.800	40%	1.540
2.500	4.500	60%	800	2.800	3.100	40%	180
4.500	8.000	75%	875	3.100	-	100%	
8.000	-	100%		-	-		
Egingjald í alt			3.575	Egingjald í alt			2.320
Pr. mðr.			298	Pr. mðr.			193

Talvan niðanfyri vísir umleið, hvussu nógv útreiðslurnar hjá Heilsutrygd minka árliga við at broyta tilskotsstigan sum víst omanfyri.

18 ár til pensjónsaldur	3.815.900
Pensjónistar	3.407.138
Fyritíðarpensjónistar	725.860
Tilsamans	**7.948.898**

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Av tí at hetta uppskotið hevur stóran skund, hevur tað ikki verið til hoyringar hjá viðkomandi hoyringarpørtum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Broytingaruppskotið um at broyta tilskotsstigan krevur broyting í KT-skipanini hjá Apoteksverkinum. Hetta fer møguliga at hava við sær ein ávísan kostnað fyri Apoteksverkið.
Broytingarnar í lógini fara ikki at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.
Útreiðslurnar hjá landskassanum lækkað við nærum 7,9 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Broytingin í tilskotsstiganum krevur tillagingar av KT- skipanini hjá Apoteksverkinum, og krevur tað starvsfólkaorku hjá Apoteksverkinum at gera hesar tillagingar.
Broytingarnar í lógini fara ikki at hava umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Broytingin í tilskotsstiganum fer at ávirka borgarar, ið nýta heilivág, sí myndirnar niðanfyri av galdandi tilskotsstiga og teimum ætlaðu broytingunum:

Galdandi tilskotsstigi fyri 18- 67 ára gomul:

0-578	0 %
578-1173	40 %
1173-2346	60 %
2346-6221	75 %
6221-	100 %

Galdandi tilskotsstigi fyri persónar yvir 67 ár og fyritíðarpensjónistar:

0-578	0 %
578-1173	40 %
1173-2346	60 %
2346-2793	75 %
2793-	100 %

Tilskotsstigi fyri 18 ára gomul til pensjónsaldur sambært lógaruppskotinum:

0-1000	0 %
1000-2500	40 %
2500-4500	60 %
4500-8000	75 %
8000-	100 %

Tilskotsstigi pensjónistar og fyritíðarpensjónistar sambært lógaruppskotinum:

0-600	0 %
600-2800	30 %
2800-3100	40 %
3100-	100 %

Broytingin í tilskotsstiganum hevur við sær, at egingjaldið, sum borgarar í mesta lagi fara at gjalda, hækkar við ávikavist 100 kr. um mánaðin fyri persónar yvir 18 ár til pensjónsaldur, og 66 kr. um mánaðin fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar. Børn og ung undir 18 ár rinda framvegis ikki egingjald.

Persónar sum eru yvir 18 ár og til pensjónsaldur, sum brúka lítið av heilivági, fara lutfalsliga at rinda ein størri part sjálvi. Sambært broytingunum í heilivágsstiganum verður egingjaldi 3.575 kr. um ári ella 298 kr. um mánaðin hjá teimum, sum rinda mest.

Hjá pensjónistum og fyritíðarpensjónistum verður egingjaldi 2.320 kr. um ári ella 193 kr. um mánaðin hjá teimum, sum rinda mest.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað er ongin millumtjóðasáttmáli á økinum, ið hevur ávirkan á uppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Hoyvíkssáttmálin
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og tað ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
§ 18, stk. 1
Heilivágstilskotið verður ásett út frá einum progressivum (stígandi, vaksandi, økjandi) leisti, soleiðis at borgarar, sum brúka nógvan heilivág, rinda lutfalsliga minni enn tey, sum brúka lítið av heilivági.

Heilivágstilskotið verður roknað fyri eitt ár, byrjandi við fyrsta keypinum í árinum og eitt ár fram. Eitt nýtt tíðarskeið byrjar frá fyrsta keypinum av heilivági eitt ár eftir, at viðkomandi keypti heilivág í undanfarna tilskotsári. Um ein borgari t.d. keypti heilivág 3. mai 2022, so endar hetta tilskotsárið tann 2. mai 2023. Keypir sami persónurin so heilivág í hesum tíðarskeiðnum, verður alt hetta keypið partur av tilskotsárinum. Er einki keyp av heilivági millum 2. mai 2023 og 15. juni 2023, byrjar tað nýggja tilskotsárið hjá viðkomandi borgara frá hesum degi, tann 15. juni 2023. Upphæddirnar í heilivágstilskotsstiganum verða árliga ásettar í kunngerð, eftir at upphæddin er javnað við prísvøkstrinum á heilivági í farna ári.

§ 18, stk. 2
Onki tilskot verður veitt borgarum, ið eru 18 ár og til pensjónsaldur, til keyp av heilivági, um kostnaðurin fyri heilivágskeyp í einum ári er undir 1.000 kr.

§ 18, stk. 3
Tilskot til heilivág verður ásett út frá einum progressivum (stígandi, vaksandi, økjandi) leisti, soleiðis at borgarar, sum brúka nógvan heilivág, rinda lutfalsliga minni enn tey, sum brúka lítið av heilivági.

Heilivágstilskotið verður roknað eins fyri allar borgarar, ið eru 18 ár og til pensjónsaldur. Fyri øll er galdandi, at tey sjálvi rinda allar útreiðslur upp til 1.000 kr. Síðani verður tilskoti roknað út frá einum samsvarandi skala, soleiðis at tilskoti er 40 % fyri útreiðslur millum 1.000 kr. og 2.500 kr.; 60 % í tilskoti fyri útreiðslur millum 2.500 kr. og 4.500 kr., og 75 % í tilskoti fyri útreiðslur millum 4.500 kr. og 8.000 kr. Um heilivágsútreiðslurnar fara upp um 8.000 kr., verða latin 100 % í tilskoti. Sostatt rindar Heilsutrygd allar heilivágsútreiðslur eftir hetta, og rindar borgarin onki fyri heilivág, tað ið er eftir av tilskotsárinum.

§ 18, stk. 4
Onki tilskot verður veitt pensjónistum ella fyritíðarpensjónistum fyri heilivágskeyp undir 600 kr.

§ 18, stk. 5
Tilskot til heilivág verður ásett út frá einum progressivum (stígandi, vaksandi, økjandi) leisti, soleiðis at borgarar, sum brúka nógvan heilivág, rinda lutfalsliga minni enn tey, sum brúka lítlan heilivág.

Heilivágstilskotið verður roknað eins fyri allar borgarar, ið eru pensjónistar ella fyritíðarpensjónistar. Hesin bólkur rindar sjálvur allar heilivágsútreiðslur upp til 600 kr. Síðani verður tilskotið roknað út frá einum samsvarandi leisti, soleiðis at tilskotið er 30 % fyri útreiðslur millum 600 kr. og 2.800 kr. Síðani verða 40 % veitt í tilskoti til heilivágskeyp, sum kostar millum 2.800 kr. og 3.100 kr. Um heilivágsútreiðslurnar fara upp um 3.100 kr., verða

latin 100 % í tilskoti. Sostatt rindar Heilsutrygd allar heilivágsútreiðslur eftir hetta, og rindar borgarin onki fyri heilivág, tað ið er eftir av tilskotsárinum.

§ 18, stk. 6
Børn undir 18 ár gjalda ikki egingjald til tilskotsheimilaðan heilivág.

§ 18, stk. 7
Um ein persónur fyllir 18 ár í einum tilskotsári verður tilskotið roknað sambært stk. 2 og 3.

§ 18, stk. 8
Um ein persónur verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í einum tilskotsári, verður tilskotið roknað sambært stk. 4 og 5.

§ 18, stk. 9
Upphæddirnar í heilivágstilskotsstiganum verða árliga ásettar í kunngerð, eftir at upphæddin er javnað við prísvøkstrinum á heilivági í farna ári

Til § 2
Broytingarnar í heilsutrygdarlógini koma í gildi 1. januar 2024.

Heilsumálaráðið, 29. september 2023

Margit Stóra
landsstýriskvinna

/ Turid Arge

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur